## DAGSINS MEINING

# Tvey lógarbrot

Í blaðnum í gjár høvdu vit tvær tíðindagreinir, har greitt varð frá tveimum lógarbrotum innan almennu umsitingina. Landsstýrismálanevndin hevur staðfest, at Fiskimálaráðið hevur brotið lógina í samband við flyting av einum veiðiloyvi. Lesarar okkara kenna málið, so ikki er neyðugt at fara í smálutir við hesum. Stutt kann sigast, at Landsstýrismálanevndin beinleiðis leggur landsstýrismannin í fiskivinnumálum undir ikki at fylgja landsins lógum. Lesnaðurin av frágreiðingini er sterkur lútur!

Hitt málið snýr seg um sjálvasta løgmálaráðharran og hansara umsiting. Í einum máli um umsiting av navnalógini og um kunngerð í hesum sambandi sigur Løgtingsins umboðsmaður orðarætt: „Eftir mínari meting er landsstýrismaðurin farin út um sína heimild“. Hetta er ikki veikari lútur! Heldur sterkari, tí talan er ikki um, hvønn sum helst men um sjálvan landsins løgmálaráðharra sum tann, ið meira enn nakar annar eigur at halda lógina! Í stuttum snýr hetta málið seg um, at landsstýrismaðurin legði uppskot við endurskoðaðari navnalóg fyri løgtingið fyri nøkrum árum síðani. Úrslitið, tá lógin var samtykt, gjørdist ein nakað meira liberal navnalóg við størri møguleikum fyri undantøkum. Hetta hóvaði ikki løgmálaráðharranum. Sambært niðurstøðuna hjá umboðsmanninum hevur løgmálaráðharrin nýtt høvið at skerja undantaksmøguleikarnar við kunngerð. Hann ger altso eina kunngerð, sum ikki er í samsvar við lógina! Hetta er ein margháttlig framferð av einum løgmálaráðharra!

Eftir stendur spurningurin, hvat nú hendir. Fáa hesi bæði lógarbrotini fylgjur fyri viðkomandi ráðharrar? spyrja fólk, ið eru ørkymlað av støðuni. Okkara boð er, at lógarbrotini fáa als ongar fylgjur. Í staðin fara vit at fáa ein orðafloym, sum skal burturforklára lógarbrotini. Og síðan verða lógirnar helst broyttar, so tær verða í samsvar við tað, sum longu er hent og alt verður gloymt. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nú má løgmaður vakna

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Løgmaður plagar at siga, at hann ongar løgfrøðingar hevur á løgmansfyrisitingini, og at tað tí er møtimikið hjá honum at liva upp til sína skyldu, at hava eftirlit við embætisførsluni hjá landsstýrismonnum. Hann hevur tó átikið sær hesa skyldu og má liva upp til hana.

Bæði málið um navnalógina og málið um persónsupplýsingar hava verið so nógv frammi, at løgmaður eigur at hava varnast, at her ruggar ikki alt rætt hjá landsstýrismanninum í lógarmálum.

Tí áliggur tað honum at kanna embætisførsluna hjá Høgna Hoydal, í málinum um Gjaldsskipanina hjá Elekron, hóast tað í tí førinum óiva er serliga trupult, men ikki minni álvarsamt, tí landsstýrismaðurin sær út til at hava Løgmálaráðið við sær.

Umboðsmaðurin hevur júst staðfest, at Høgni Hoydal fór út um sínar heimildir, tá hann gjørdi eina strangari kunngerð um fólkanøvn, enn hann hevði heinild til í lógini. Málið um Gjaldsskipanina hjá Elektron er nærum identiskt, men eisini meiri álvarsamt, tí Høgni Hoydal í nýggjari kunngerð, hevur givið boð um, uttan lógarheimild, at ólógliggera Gjaldsskipanina afturvirkandi, aftaná at Elektron í skjótt 2 ár, við loyvi frá Dátueftirlitinum, hevur ment skipanina, ið er farin at virka.

Løgmaður kann ikki longur standa og hyggja at, meðan rættartrygdin víkir fyri politisku áhugamálum og rættarfatan Høgna Hoydals.

# Opið bræv til Anders Fogh Rasmussen

**Høgni Hoydal, formaður**
*Vegna Tjóðveldisflokkin*



(sent á føroyskum og í danskari umseting til danska forsætisráðharran)

**Góði Anders Fogh Rasmussen.**

Hjartaliga vælkomin til Føroya. Tú fert á hesi ferðini at fáa sjón fyri søgn fyri, at her býr eitt eitt fólk við egnari mentan og egnum mátti at klára seg á jøvnum føti við heimsins sjálvstøðugu tjóðir. Føroyska tjóðin hevur aldri valt at gerast partur av danska statinum og hevur ongantíð givið nøkur rættindi frá sær.

– Tí kann tað bert vera ein stór misskiljing, at stjórnin hjá tær hevur lýst eina røð av lógum í Føroyum, hóast eitt samt Løgting hevur samtykt tað øvuta. Vit fara at heita á teg um at nýta høvi at rætta henda órætt, meðan tú ert í Føroyum.

Føroyingar hava sett kós móti fullum sjálvstýri, og tað hevur seinastu árini givið ótrúlig úrslit. Samfelagið er ment ómetaliga, síðani vit góvust at krevja og brúka meira pengar úr Danmark og ístaðin fóru at fremja tað, sum vit sjálvi megna.

Tú minnist helst, hvørjum skørum føroyska samfelagið var í fyri 10 árum síðani, tá vit brúktu eina milliard í blokkstuðli og læntu pengar uttanlands afturat. Og hygg at samfelagnum nú, har vit fyrst hava sett blokkstuðulin til viks og síðani hava minkað hann við einum triðingi.

Føroyska fólkið hevur rættindir sum onnur fólk í heiminum. T.e., at vit hava rætt at skipa okkum sum sjálvstøðuga tjóð - ikki í stríði við Danmark, men hinvegin í sátti og semju. Henda sjálvsagda veruleika, hava danskir myndugleikar higartil ikki viljað viðurkent, men tú kanst velja tað øðrvísi.

Í tíni egnu bók frá 1993 skrivar tú millum annað: »…ønsket om personlig frihed, bliver underordnet trygleriet efter materiel sikkerhed (…) Prisen er selvsagt, at det ufri menneske bøjer nakken og glemmer alt om højere værdier end denne ene konfliktfri og komfortable selvopretholdelse.«

Tí manst tú sjálvsagt skilja, at fullveldi er framtíðin fyri føroyingar, um vit ikki skulu halda fram sambært sambært tíni lýsing.

Føroyska fullveldisgongdin kann ikki støðgast. Lat okkum tí fremja hana so skipaða sum gjørligt.

– Tí vóna vit, at tú á ferðini her fer at taka undir við, at arbeiðið at yvirtaka løgreglu, rættarskipan, fólkakirkjuna, útlendingamál, familjurætt og peningamál, kann fremjast í verki við eini yvirtøkulóg.

– Tí skjóta vit somuleiðis upp, at tú tekur undir við at skerja blokkstuðulin við einum triðingi afturat og so strika skuldina hjá føroyska landskassanum til danska statin. Tað er rættiliga meiningsleyst, at vit á hvørjum ári skulu taka ímóti 616 milliónum krónum úr Danmark og so senda 323 milliónir niðuraftur.

Við vón um ítøkilig úrslit á ferðini.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## UTTAN ÚR HEIMI

# Skúlagentur burturfluttar í navni Harrans

**Týsnáttina burturflutti Harrans mótstøðuherur minst hundrað skúlagentur í Uganda. Hildið verður, at sami herurin hevur burturflutt umleið 20.000 børn.**

UGANDA
*Árni Joensen*

Ugandiska herleiðslan kunngjørdi fyrradagin, at uppreistrarherurin LRA hevði rænt og burturflutt meiri enn hundrað gentur á einum katólskum skúla, og seinni váttaði katólska kirkjan í býnum Soroti tíðindini. Sambært kirkjuleiðsluni eydnaðist tað nøkrum gentum og lærarum at sleppa til rýmingar.

Myndugleikarnir í Ugandа og altjóða hjálparfelagsskapir halda, at ugandiski uppreistrarherurin hevur burturflutt umleið 20.000 børn seinastu fýra árini. Bæði genturnar og dreingirnir verða nýtt sum hermenn í bardaganum ímóti stjórnarherinum, og harafturat verða genturnar kynsliga misnýttar. Tá tær einaferð koma heimaftur, hava fleiri teirra eitt barn við sær, og harafturat líða flestu teirra av einari ella aðrari kynssjúku, siga ugandisku myndugleikarnir.

Leiðarin hjá uppreistrarmonnunum, Joseph Korry, at hann ger eftir beinleiðis boðum frá Várharra, tá hann sendir gentur og dreingir í bardaga ímóti ugandiska stjórnarherinum.

# Heimsins hægsta hús



*Hesin nýggi bygningurin, sum eitur "Two IFC", er í Hongkong og er sambært byggiharranum hægsti bygningur í heiminum. Hann er 420 metrar høgur í 88 hæddum. Allur bygningurin er innrættaður sum skrivstovur, og fermetratalið liggur um 200.000. Tað er arkitekturin Cesar Pelli, sum er ættaður úr Argentina, sum hevur teknað bygningin.*

# Amerikanararnir fúsir at leypa á Iran

**Meirilutin av amerikanska fólkinum heldur, at forsetin gjørdi rætt í at leypa á Irak og at herseta landið. Teir eru eisini til reiðar at fara í eitt kríggj afturat.**

KRÍGSHUGUR
*Árni Joensen*

Er tað neyðugt at fara í kríggj við Iran fyri at forða landinum at fáa sær kjarnorkuvápn, er tað í lagi. Tað siga 58 prosent av teimum amerikanarunum, sum blaðið Washington Post og sjónvarpið ABC News hava spurt. 38 prosent av teimum spurdu siga nei.

Bæði USA og ES hava hert atfinningarnar at iranstku stjórnini í seinastuni, tí hon sýtir fyri at lata altjóða kjarnorkustovnin fáa atgongd til landsins kjarnorkuverk.

Leiðarin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum, sviin Hans Blix, heldur ikki, at ósemjan við Iran nýtist at enda í einum kríggi afturat. Á einum fundi í New York fyri stuttum segði hann, at ein eigur at hava trygdarviðurskiftini í økinum í huga, tá ein hyggur at hesum málinum.

- Lond sum Iran og Norðurkorea uppfata støðuna soleiðis, at tey kenna seg noydd at fáa sær kjarnorkuvápn. Tey kenna seg hótt, segði Hans Blix.

Men í USA eru tað amerikanararnir, sum kenna seg hóttar, so skjótt teir hoyra, at onnur lond umhugsa at fáa sær kjarnorkuvápn. Kanningin hjá Washington Post og ABC News vísir eisini, at teir flestu amerikanararnir taka undir við krígnum í Irak, sjálvt um tað skuldi víst seg, at Irak als ikki hevði nøkur hópoyðingarvápn, sum annars vóru høvuðsgrundgevingin fyri krígnum. Bara 23 prosent halda, at tað er neyðugt at finna hópoyðingarvápnini hjá Saddam hussein fyri at rættvísgera kríggið.

At kríggið hevur kostað umleið 230 amerikanskum og bretskum hermonnum lívið halda flestu amerikanararnir vera rímiligt.

# Byggja aftur

Jødisku niðursetufólkini á Vestara Áarbakka ætla eftir øllum at døma ikki at gera eftir boðunum frá stjórnini um at flyta haðani.

Seinastu dagarnar hava niðursetufólkini skipað fleiri sokallaðar ávaringarstøðir. Talan er um húsvognar, sum eru settir á støðum, har ísraelski herurin fyri nøkrum døgum síðani javnaði fleiri slíkar ávaringarstøðir við jørðina. Sambært fronsku tíðindastovuni AFP hava niðursetufólkini bygt fleiri ávaringarstøðir, enn herurin hevur brotið niður ella flutt.

Ariel Sharon, forsætisráðharri, hevur í fleiri ár verið talsmaður fyri jødisku búsetingini í teimum hersettu palestinsku økjunum, men sambært teirri seinastu friðarætlanini skal Ísrael taka minst 60 prosent av teimum búsetingunum, sum eru bygdar seinastu tvey árini.

# Lívverjin í rættinum

Ein jordani, sum sigur, at hann hevur verið lívverji hjá sjálvum Osama bin Laden, hevur verið fyri rættinum í Týsklandi í vikuni.

Týska ákæruvaldið vil vera við, at maðurin er limur í einum víðgongdum hernaðarligum palestinskum felagsskapi, sum eitur Al Tawhid, og sum sambært amerikansku myndugleikunum hevur tilknýti til al-Qaeda.

Týska løgreglan tók tann 26 ára gamla mannin, tí illgruni var um, at hann hevði havt ætlanir um at søkja at fleiri málum í týskum býum. Løgreglan vil eisini vera við, at hann var við til at skipa fyri einum granatálopi á eini jødisk hús í Týsklandi.

# Flogfar rendi á fugl

Hóast flestu fuglar eru smáir samanborið við eitt flogfar, kann tað vera vandamikið fyri sjálvt tey stóru flogførini at renna á ein fugl.

Tí valdi flogskiparin á einum norskum ferðamannaflogfari at venda aftur, tá flogfar hansara rendi á ein fugl, stutt eftir at tað var farið á flog úr floghavnini í Stavanger. Tey 190 ferðafólkini, sum skuldu til Malaga í Spania, noyddust at fara úr flogfarinum, meðan eftirlitsfólk kannaðu, um tað hevði fingið skaða av samanstoytinum. Einki verður sagt um, hvat tað var fyri fuglur, sum noyddi tað stóra flogfarið at seta seg aftur.

Kanningin vísti kortini, at flogfarið var sloppið frá samanstoytinum í øllum góðum, og tveir tímar seinni sluppu ferðafólkini umborðaftur og kundu halda fram til at njóta summarfrítíðina í Spania.

# Gav bróst meðan hon koyrdi bil

Lastbilaførarin vildi ikki trúgva sínum egnu eygum, tá hann fyrr í vikuni møtti einum bili á einum vegi í amerikanska statinum Ohio.

Við róðrið í bilinum sat ein kvinna og gav einum smábarni bróst. Lastbilaførarin ringdi alt fyri eit til løgregluna og boðaði frá tí, sum hann hevði sæð. Tá løgreglumenninir steðgaðu bilinum, hevði hon hendurnar á róðrinum, annað bróstið var bert, og í fangi hennara lá tað lítla barnið og seyg.

Í rættinum fekk kvinnan 100 dollarar í bót, men maður hennara noktar at gjalda bótina. Blaðið The Beacon Journal skrivar, at í rættinum vísti maðurin á, at sambært gamla testamenti er kvinnan undirgivin manninum, og skal nakar revsa hana, skal hann gera tað. Maðurin, sum eitur Brad Barnhill, sigur, at hann er til reiðar at fara heilt upp í hægstarætt við málinum fyri at fáa staðfest støðu sína.